# Íløgur í Íslandi við fyrimuni

**Íslendska fyritøkan Sardius er í Føroyum í hesum døgum í Føroyum at bjóða føroyingum at gera íløgur í Íslandi**

ÍLØGUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nú er lagaliga løtan at gera íløgur í Íslandi.

Í hesum døgum er íslendska fyritøkan Sardius í Føroyum fyri at bjóða føroyingum at gera íløgur í Íslandi.

Stjórin í Sardius, Halldór Pálsson, sigur, at løtan nú er júst hin rætta.

Húsa- og íbúðarprísirnir er í løtuni minst 20% undir marknaðarprísunum fyri góðum mánaði síðani, og hartil er íslendska krónan lækkað niður í næstan einki, sigur Halldór Pálsson.

Hann mælir tí føroyingum til, at gera íløgur í »betong« í Íslandi, tí tað hjálpir íslendska búskapinum við útlendskum íleggjarum, samstundir sum føroyingar gera eina góða íløgu.

Føroyingar kunnu gera íløgur í hús ella íbúðir ella aðrar bygningar í Íslandi, halda upp á hesar íløgur í eini tvey ár, fyri síðani at kunna selja aftur við góðum vinningi, sigur Haldór Pálsson.

Hann bjóðar inn til kunnandi fund á Hotel Streym í morginb klokkan 17, har hann fer at greiða nærri frá møguleikunum hjá føroyingum í Íslandi. Øll áhugað eru vælkomin.




*Halldór Pálsson bjóðar nú føroyingum at gera íløgur í Íslandi við fyrimuni*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Pitsarí hækkar reinførið

**Eftir at hava verið á einum skeiði í reinføri og bakteriuflutningi eru arbeiðshættirnir í matstovuni Pizza 67 í Havn, nógv broyttir. Starvsfólkini eru meira tilvitaði, sigur Ólavur Danielsen, varaleiðari í fyritøkuni**

MATSTOVA
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

Í oktober mánaði vóru øll starvsfólkini á Pizza 67 í Havn á einum fimm-tíma skeiði, har tey vórðu kunnað um reinføri, handfaring og bakteriur.

- Orsøkin til skeiðið var at kunna starvsfólkið, so matvøran altíð er í lagi, sigur varaleiðarin, Ólavur Danielsen. - Reinføri kann betrast, men tað er eisini umráðandi at kenna orsøkirnar til, hví ymiskir fram-ferðarhættir verða nýttir í sambandi við matgerð.

Í alt vóru 25 skeiðsluttakarar á skeiðnum. Ikki einans tey, ið starvast í køkinum, men eisini tænarar og útkoyrarar. Ætlanin er at hava slík skeið regluliga, so starvsfólkið og viðskiftafólkini eru kunnaði um, at allar ásetingar verða hildnar.

## Ávirkan á arbeiðið

Matstovan merkir munin, tí arbeiðshættirnir eru nógv broyttir. Millum annað eru allar vørueskjur bannaðar úr køkinum. Bakteriur finnas í innpakningi, og tí verða allar eskjur tømdar uttanfyri, og vøran borin inn. Nakað av útgerð er eisini skift út, millum annað eru gomlu skeribrettini, ið vóru úr træ skift út við plast, tí ikki ber til at vaska allar bakteriur úr trænum.

Viðvíkjandi útkoyringini verða bilarnir nú oftari vaskaðir og somuleiðis taskurnar, ið maturin verður hildin heitur í. Fyri tænararnar merkir skeiðið, at maturin, ið verður borin út, bæði til sjálvtøkuborðið og í matstovuni, skal vera nóg heitur fyri at lúka krøv innan hetta.

- Starvsfólkini hava tikið væl móti nýggja lærdóminum, og nógv er broytt. Skeiðið kann eisini nýtast uttanfyri arbeiðsplássið, í heiminum og til at vísa á, at man hevur eitt skeið innan reinføri, sigur Ólavur Danielsen. Hann leggur afturat, at skeiðið hevur verið til gagns fyri matstovuna og harvið viðskiftafólkini, at eitt slíkt skeið átti at verðið sett sum krav til allar matstovur og tey, sum starvast innan hesav vinnuna í Føroyum.



*Nógv er broytt á pitsarínum eftir øll starvsfólkini hava verið á skeiði í reinføri*

**Bilur góður í kava til sølu**

**Nissan Terrano 2.7 Turbo diesel 4x4**



Nissan Terrano 2.7 Turbo diesel 4x4 frá januar 2003 til sølu. Hevur koyrt 60.000 km.

Vetrardekk á felgum fylgja við.

**Prísur: 89.000 kr.**

Nýprísur 240.000 kr

Grón
**BAKARÍIÐ GRÓN**
**att: sveinur +298 236213**

**Ger kvetti!! Til sølu**

**Hyundai Santa Fe 4 x 4**



Hyundai Santa Fe 2,2 Turbo disel. Vetrardekk á felgum fylgja við.

Árg. 09.06. Km. 50.000

**Prísur: 225.000 kr.**

Nýprísur 410.000 kr.

Grón
**BAKARÍIÐ GRÓN**
**att: sveinur +298 236213**